# Weekend á deildini



Eyðun Johannesen er leikstjóri tá Gríma hin 17. mars fer at framføra “Eitir nakað land Weekend”. Høvundur og vinnari í leikritakappingini hjá Leikpalli Føroya er Jóannes Nielsen. Sunnudagin fær hann stóru virðislønina handaða

Myndamaður: Edvard Joensen

**VERKAMAÐURIN OG LEIKLISTIN. Tað várar fyri fyri føroyskari leiklist. Hóast vetur er á deildini og hon er afturlatin, hava vit nógv og gott í væntu, tá Gríma hin 17. mars fer at frumsýna nýggja leikin hjá Jóannesi Neilsen “Eitir nakað land Weekend”. Í gjár var høvið at lúra á Meiarínum**

SJÓNLEIKUR
*Birgir Kruse*

At hjarta Jóannesar Nielsen slær hart fyri Skipasmiðjuni er einki nýtt. Hann hevur bæði yrkt, leikað og barst fyri hesum staði og teim, sum har virka. Men hin 17. mars síggja vit hesa staðfesting í nýggjum ljósi á gamla Meiarínum í Havn.

Tá fer yrkisleikbólkurin Gríma at frumsýna leikin “Eitir nakað land Weekend”. Henda várdag, fer høvundurin Jóannes Nielsen at sita undir liðin á sjálvum skipasmiðjustjóranum Poul Mohr. Tað var treytin, tá Skipasmiðjan, kvitt og fritt, lat pallin til nýggja leikin á gamla Meirarínum. Enn ein hugfarslig staðfesting av, at vinnan og mentanin kunnu ganga hond í hond. Jú, tað várar fyri leiklistini í Føroyum.

## Kveikjandi leikrit

Hetta er annar leikur, Gríma framførir hetta skeiðið. Hin fyrri var “Krypilin frá Inishmaan”. “Munurin er, at hesin er føroyskur”, sigur Eyðun Johannessen, sum er leikstjóri. “Nú ber altíð til at ringa til høvundan og spyrja, kjakst og laga til, so best fæst burturúr” sigur ein vælhýrdur leikstjóri, sum samstundis hugleiðir um bæði Shakespeare og Ibsen. “Hetta er gott leikrit, sum beinan vegin kveikti” sigur Eyðun um tekstin hjá Jóannesi.

Jú, sanniliga, tað várar. Her kennist ein lívsæl vón í gamla Meiarínum. “Eins og “Krypilin” er hetta ein oyggjaleikur” sigur Eyðun “men hesuferð heima hjá okkum og ikki fyrr í tíðini, men beint ídag.”

## Hvar fór Johanna?

Meðan Eyðun grundar yvir Ibsen og hansara Noru, vil hann reisa spurningin um Johannu. Tað er ein av teim seks leiklutunum í nýggja leikinum hjá Jóannesi.

Eins og fýra onnur er Johanna á afturlatnari deild. Er hon sjúk? Er hon sjúklingur? Hetta fær Ega Dam at viðmerkja, at landið alt er ein stongd deild. Katarin Nolsøe, sum hevur leiklutin sum Johanna á afturlatnu deildini, nevnir heilaárið. Ein heppin avgerð, at seta ljós á henda part í samfelagnum, júst nú.

Men heilaárið hevði eg ikki í huganum, skundar Jóannes sær at siga. Og so er kjakið ígongd í hesum livandi umhvørvi.

Hetta eru tey “gaggaðu” sum vit siga. Her hitta vit tey mest forpíndu í samfelagnum, sigur Eyðun, sum greiðir frá, at tey í fyrireikinginum hava havt samband við professionell fólk á afturlatnari deild.

Hóast leikurin ikki er dokumentatión, hava tvær deildarsjúkrasystrar lisið handritið. Tær hildu fyri, at hetta handrit Jóannesar var sum at lesa dagbók av deildini. “Hetta er gerandisdagur okkara” søgdu tær.

Tveir dagar undan hevði høvundurin tó fingið leikritið aftur í høvdið við boðunum um, at tað var ónýtiligt. Soleiðis er so mangt. Vit sansa samstíðina so ymiskt, sum júst er eitt av akkerspunktunum í leikinum, skilji eg.

Hvørt ár verða 400 føroyingar innlagdir á afturlatna deild. “Tey eru okkara medmenniskju”, sigur leikstjórin. “Og eg haldi, at tey sansa okkara sansaleysu tíð best”, sigur Eyðun Johannesen.

Hvagar Johanna fer, hundrað ár eftir Noru, kunnu vit enn bara gita um. Várdagin hin 17. mars fæst svarið.

## Jól og Jesus

Leikurin “Eitir nakað land Weekend” fer fram í samtíð okkara í tíðarskeiðnum frá november til út móti páskum. Í einum broti, sum sýnt varð á gamla Meiarínum í gjár, vóru vit á jólum.

Jól og Jesus eru samrøðuevnið, meðan tey pynta á deildini. Fýra sjúklingar. Fimti sjúklingurin, sum hevur hildið seg kúrran eina løtu, kemur inn á pallin. Intens og støðugt sigarettroykjandi. “Eg stríðst gjøgnum lívsins brøttu aldubrot” sigur hon patetisk og avdúkar ertandi men desperata láturin, vit kenna úr “Krypilinum”. Jú, hetta er Kristina. Jól eru á deldini og í knøppum orðum og keipum kenna vit lívssøgu hennara. Frálíkt.

Egi Dam fær um ein endan og kastar seg út í eitt anarkistiskt skemt kring jól og jólahald. Tá eg hoyri orðið “kotelettakirkjan”, kenni eg stuttliga penn Jóannessar. Tvífalt frálíkt

Leikarar eru Katarina Nolsøe, Egi Dam, Hans Tórgarð, Birita Mohr og Kristina Hansen. Tey eru øll sjúklingar, sum, tá saman um kemur, tó helst munnu verða frískastu fólk í landinum. Einasti leikari, sum ikki er sjúklingur á afturlatnari deild, er Kári Øster. Hann er maður Jóhannu (Katarina Nolsøe).

## Fruktagóði ivin

Høvundurin Jóannes Nielsen vil við leiki sínum sáa ein fruktagóðan iva, so áskoðarin eftir loknan leik kann fara heim – ríkaður. Um egnu samtíð okkara og um hvat rørist og hevur týdning í dagsins Føroyum. “Hendir tað, so eri eg nøgdur” sigur Jóannes, sum í Rithøvundabókini avdúkar, at hann er forelskaður í Føroyum.

Sunnudagin fær Jóannes handað tær ikki færri enn hundrað túsund krónurnar, sum var fyrsta virðislønin í leikritakappingini hjá Leikpalli Føroya.

Sunnudagin verður harafturat lisið úr sjey av teim níggju leikritunum, sum komu inn til kappingina hjá Leikpalli Føroya. Hátíðarløtan og upplesturin verður á gamla Meiarínum klokkan 16. Tiltakið er alment og ókeypis. Jú, várið er longu gróðursett.



# Løgmaður á almenna vitjan í Bretlandi

**Um eina viku fer løgmaður á almenna vitjan í Bretlandi eftir innbjóðing frá bretska forsætisráðharranum Tony Blair. Løgmaður skal hava fundir við fiskimálaráðharran, olju- og ídnaðarmálaráðharran og varauttanríkismálaráðharran umframt 1. ráðharran fyri Skotland**

VITJANIR
*Jan Müller*



*Løgmaður fekk innbjóðingina at vitja í Bretlandi, tá marknaavtalan varð undirskrivað í Havn. Her skála bretski varauttanríkisráðharran Anthony Laiden, Anfinn Kallsberg, løgmaður og danski uttanríkisráðharrin, Niels Helveg Petersen.*

Mynd Jens K. Vang

– Eg vóni við hesi vitjan at kunna gera mítt til, at vit fáa eitt meira virkið samstarv millum Føroyar og Bretland sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður, sum fer á almenna vitjan í Bretlandi um eina góða viku. Hann dylur ikki fyri, at tað hevur ikki verið serliga nógv virkið samstarv á høgum politiskum støði higartil. Tað, sum so eisini er nýtt við hesi vitjan, er ætlanin at fáa knýtt eitt sindur fastari bond við Skotland tvs. skotska parlamentið og myndugleikarnar har.

– Eg vóni, at henda vitjan kann vera eitt startskot til eitt slíkt samstarv eins og tað vit hava havt við Hetland. Løgmaður ásannar, at vit hava fingið eitt ávíst samstarv við Hetland, sum hann heldur eisini er vert at byggja út til Skotlands, her ikki minst við atliti til oljuvinnuna.





*MVið marknaavtaluni vórðu lunnar lagdir undir eini nýggjari samvinnu millum Føroyar og Bretland. Kortið er frá Uppstream.*

Løgmaður fer ikki einsamallur til Skotlands og Onglands. Við sær eru eisini fleiri umboð fyri føroyskt vinnulív tað veri seg innan fiskivinnu, ferðavinnu og oljuvinnu. Hann vónar tí, at henda vitjan kann vera við til at skapa kontaktir eisini á tí vinnuliga økinum.

## Móttøka í London

Í hesum sambandi er ætlanin er at skipa fyri eini stórari móttøku á donsku sendistovuni í London týskvøldið 27. februar við umleið 60 umboðum úr Føroyum og serstakliga Onglandi. Eitt nú hava fleiri av stóru oljufeløgunum boðað frá, at ovastu stjórar teirra fegnir vilja vera við til móttøkuna saman við løgmanni og vinnulívsfólki úr Føroyum. Eisini Eyðun Elttør, landsstýrismaður í oljumálum verður við til hesa samkomuna. Millum umboðini frá oljufeløgum, sum vilja vera við til hesa móttøku e ovasti stjórin í amerikanska oljufelagnum, Amerada Hess, John B. Hess. Eisini oddafólk í BP og British Gas hava boðað frá luttøku.

Hetta verður so fyrsta almenna vitjan hjá einum føroyskum løgmanni í Bretlandi. Innbjóðingin kom frá Tony Blair, forsætisráðharra eftir vitjanini hjá Anthony Laiden, fyrrv. Varauttanríkisráðharra í Føroyum fyri tveimum árum síðani, tá marknaavtalan millum Føroyar og Bretland varð undirskrivað. Orsøkin til at vitjanin síðani hevur verið útsett fleiri ferðir eru viðurskifti bæði í Føroyum og Bretlandi. Eitt nú samráðingarnar við danir um fullveldið.

Men nú verður vitjanin so til nakað. Løgmaður fer saman við konuni Berghild til Skotlands sunnudagin 25. februar. Mánadagin verða ymisk tiltøk í Aberdeen og mánakvøldið verða løgmanshjúnini gestir við ein døgurða hjá 1. ráðharranum (Deputy First Minister) í Skotlandi, Jim Wallace. Tað verður í Edinburh. Týskvøld verður so móttøka á donsku sendistovuni í London fyri innbodnum úr Føroyum og Bretlandi. Mikudagin 28. februar fer løgmaður at hitta fleiri ráðharrar, eitt nú Peter Hein, oljumálaráðharra, John Battle, varauttanríkisráðharra og helst eisini fiskimálaráðharran.

Talan verður sostatt ikki um at hitta hægstu ráðharrarnir í stjórniniso sum forsætisráðharran ella uttanríkisráðharran , men tað verða fundir við ráðharrar á teimum økjum innan vinnuna. -Har vit hava eitt náttúrligt samstarv við bretar, verður roynt at fáa fund við ráðharrar ella fólk í leiðandi størvum sigur løgmaður.

## Hví Bretland

Nú Føroyar í stóran mund hava tradtión at samstarva við Norðurlond heldur løgmaður tað vera náttúrligt eisini at venda eyguni móti Bretlandi, tí her er ein stórur marknaður. -Vit hava sum er stóran samhandil við Bretland, men skal tú koma víðari, so krevur tað av okkum, at vit fara har sum serfrøðin og marknaðurin er. Kappingin er eisini ótrúliga týdningarmikil, bæði tá tað snýr seg um at seta krøv til okkum sjálvar og um at finna okkum samstarvspartnarar, sum kunnu geva tað størsta útbýti til tað føroyska samfelagið heldur løgmaður fyri.

Anfinn Kallsberg dylur heldur ikki fyri, at infrastrukturin í slíkum samskifti er so ómetaliga týdningarmikil.

–Tað er greitt, at Norrøna hevur havt stóran týdning fyri part av hesum økinum, og tí er tað eisini sera hugaligt, at hetlendingar, sum hava fingið oljupengar í grunnar, ið nettupp hava við infrastruktur at gera, síggja tað sum eina strategiska íløgu at seta 50 mill. kr. í eina nýggja Norrønu. Tí kann eg bert fegnast um.<None>

*Løgmaður skal m.a. hitta spildurnýggja ídnaðar- og oljumálaráðharran Peter Hain í Westminister í London.*



